

*Frændur fara at spæla á nýggjárskonsertini í ár*

# Nýggjárskonsert við tí heitasta

**Tríggir føroyskir bólkar fara at spæla á árligu nýggjárskonsertini, sum hesaferð verður hildin leygarkvøldið 27. desember. Talan er um bólkar, sum eru aktuellir á útgávum og hitlistum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Frændur, Páll Finnur Páll og I AM verða teir tríggir bólkarnir, sum skulu undirhalda, tá ið árliga nýggjárskonsertin, sum hondbóltsfelagið Kyndil skipar fyri, verður í Havn millum jóla og nýggjárs.

Hetta er ein konsert, sum hevur verið hildin í nógv ár, og hesaferð verður ikki minni gjørt burturúr enn áður.

Í øllum førum hava fyrireikararnir fingið nøkur av teimum heitastu nøvnunum í føroyskum tónleiki í løtuni at spæla.

## Framvegis gott

Frændur verða høvuðsnavn á konsertini, og tey, sum hava upplivað Frændur á konsertum seinastu árini, vita, at bólkurin hevur ótrúliga stóra undirtøku millum fólk. Ikki bara tey, sum vóru ung, tá ið sangirnir hjá bólkunum komu út, men sanniliga eisni børnunum hjá hesum fólkum.

Frændur hava skrivað sangir í 20 ár, sum ein fyri og annar eftir eru vorðnir fólkaogn, og tá ið teir spæla á konsertum er talan um eina perlurekkju frá teimum.

Sangir sum Gildið, Hundurin Brúni, Føroyar og aðrir rigga væl til slík konsertkvøld.

## Funnu toppin

Páll Finnur Páll hava fingið rættiligt gjøgnumbrot í føroyskum tónleiki seinastu mánaðirnar. Orsøkin til tað er, sum ofta við tónleikabólkum, ein sangur, sum fólk hava tikið til sín – eitt hitt.

Tað er tann melodiøsi sangurin um Forelskaða Sjónleikaran, sum hevur tikið fólk á bóli, og seinastu mongu vikurnar hava Páll Finnur Páll verið ovast á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá Útvarpinum.

Páll Finnur Páll hava upplivað, at hittið hevur givið teimum alt fleiri uppgávur. Nú verða teir bidnir at spæla á nógvum konsertum, og fólki dámar teir væl.

## Gospelrockur

I AM hevur nú givið sína næstu fløgu út, og rockurin frá gospelbólkinum er væl dámdur millum ungfólk.

I AM hevur nú í fleiri ár verið fremsti føroyski gospelbólkurin, og teir staðfestu eisini sína støðu, tá ið teir vunnu Gospel Prixið fyrr í heyst.

Teir eru ein væl samanspældur bólkur, sum riggar væl á einum palli. Teir fáa lív í áhoyrararnar, og so hava teir eisini nógvar góðar sangir at taka av.

Nýggjárskonsertin verður leygarkvøldið 27. desember kl. 23.00 í ítróttarhøllini á Hálsi.






